Dagf. 5. juni 2020
HMR J. nr. 20/00493-5

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 89/2019 eftir § 52a í tingskipanini um ADHD frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni

Spurningurin var soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv hava fingið staðfest ADHD í Føroyum býtt upp í útgreinað privat og útgreinað alment?

2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv hava fingið staðfest ADHD í Føroyum býtt eftir aldursbólkum (eldri og yngri enn 18 ár)?

3. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu long bíðitíðin til útgreining hjá vaksnum er í dag, og nær tað kann væntast, at bíðitíðin kemur niður á tríggjar mánaðir, sum er ynskiligt?

4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær ADHD klinikkin eftir ætlan fer at virka?

5. Og ætlar landsstýrismaðurin at gera tað møguligt hjá fólki, sum hava fingið staðfest ADHD við privatari útgreining, at sleppa inn í heilsuskipanina og komandi ADHD klinikkina?

Svar:

Til spurning 1 og 2

Tað er ongastaðni skrásett, hvat virksemi verður útgreinað av privat praktiserandi læknum.

Heilsumálaráðið hevur fingið upplýst frá Landssjúkrahúsinum, at tað í verandi støðu ikki er møguligt at fáa valideraði hagtøl úr almennu skipanini, um hvussu nógv hava fingið staðfest ADHD, og tí ei heldur hvussu hesi eru bólkaði.

Avbjóðingin við at fáa nøktandi hagtøl úr almennu journalskipanini er nakað, sum landsstýrismaðurin hevur sett fokus á.

Til spurning 3

Væntað verður, at bíðitíðin hjá teimum, sum verða ávíst í dag og frameftir, ikki verður long, og strembað verður eftir, at bíðitíðin, innan fyri komandi árið, er komin niður á tríggjar mánaðir. Landsstýrismaðurin hevur upprøfest ADHD klinikkina á Landssjúkrahúsinum við hægri játtan í 2020, og ætlanin er at raðfesta hetta økið eisini í 2021.

Tey, sum í dag standa ovast á bíðilistannum at sleppa til útgreining, eru ávíst á vári 2017 – og sostatt var bíðitíðin í 2017 trý ár, men arbeitt verður í ár við at stytta bíðilistan, og átøk eru gjørd fyri, at hetta skal eydnast. Samstundis verða alsamt fleiri ávíst til greiningar, og tí er eisini neyðugt at raðfesta økið fyri at fáa bíðitíðina niður.

Í juni 2019 stóðu 109 fólk á bíðilistanum til ADHD. Á heysti 2019 byrjaði eitt átak fyri at fáa bíðilistarnar niður, og av teimum 109 eru 46 síðani tikin av - út móti eini helvt. Síðani juni 2019 eru 62 nýggjar ávísingar móttiknar, og eru hesi løgd afturat bíðilistanum. Sostatt standa í dag 135 fólk á ADHD-bíðilistanum. Av teimum, sum nú standa á bíðilistanum, er tann fyrsti, sum sagt, ávístur í 2017 (24 av teimum á listanum er ávíst í 2017, 15 í 2018, 65 í 2019 og higartil 31 í 2020).

Samanumtikið er ADHD økið raðfest í 2020 við hægri játtan, og verður eftir ætlan raðfest eisini í 2021, soleiðis at bíðitíðin tá kann koma niður á tríggjar mánaðir.

Til spurning 4

ADHD klinikkin á Psykiatriska deplinum hevur virkað í fleiri ár. Arbeitt verður við at víðka um klinikkina, og játtanin til klinikkina er sum nevnt økt í 2020. Arbeiðið gongur væl, hóast tað er nakað seinkað vegna covid-19 farsóttina. Í hesum døgum verður lýst eftir sálarfrøðingi og sosialráðgeva at byrja tann 1. august 2020. Harumframt hevur yngri lækni verið settur frá 1. mars 2020, og sjúkrarøktarfrøðingur hevur verið settur fyri alt hetta árið.

Í løtuni eru 275 fólk knýtt at ADHD-klinikkini í sambandi við viðgerð. Í Danmark taka teir praktiserandi læknarnir yvir medisinsku viðgerðina, tá innleiðandi viðgerðin er sett í verk, men sambært Landssjúkrahúsinum hava kommunulæknarnir í Føroyum ikki viljað átakið sær ta framhaldandi viðgerðina av ADHD sjúklingunum. Tað merkir, at tað í løtuni tí ikki ber til hjá ADHD-klinikkini at taka eins nógvar sjúklingar inn, tá ið sjúkrahúsið eisini skal hava ábyrgdina fyri tí medisinsku viðgerðini. Tað hevur stóran týdning, at útgreining og viðgerð hanga saman á hesum øki.

Landsstýrismaðurin fer at taka stig til, at hetta mál verður viðgjørt millum avvarðandi partar við atliti at finna eina loysn viðvíkjandi tí medisinsku viðgerðini, soleiðis at Landssjúkrahúsið kann útgreina enn fleiri ADHD sjúklingar, og samstundis fáa bíðilistarnar skjótari niður.

Til spurning 5

Sambært Landssjúkrahúsinum koma fleiri av teimum, sum hava fingið staðfest ADHD við privatari útgreining inn í almennu skipanina eftir ávísing frá kommunulækna. Nøkur fólk koma eisini inn í skipanina, tí tey hava búð í Danmark og eru greinaði og sett í viðgerð har. Tað viðgerðina yvirtekur Landssjúkrahúsið eins og viðgerð av øllum øðrum, sum flyta til landið og eru í viðgerð frammanundan.
Avbjóðingin við fólki, sum eru útgreinaði privat, er ikki ovurstór, sambært Landssjúkrahúsinum.
Tað snýr seg um nakrar fáar borgarar um árið.

Heilsumálaráðið, 5. juni 2020

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður